# Umhvørvisvinarligur trolgrunnur

Í trý ár hevur verið arbeitt við einum trolgrunni, sum fer nógv betur við botninum enn ein vanligur grunnur. Hesin grunnurin rullar eftir botninum á hjólum, soleiðis, at hann ikki skaðar botnin (Mynd 1). Ein vanligur grunnur rullar ikki, men verður drigin eftir botninum.

Í september 2001 vórðu tær fyrstu royndirnar gjørdar við hesum grunni. Síðani er hann broyttur fleiri ferðir, fyri at hann skal rigga so gott, sum møguligt. Millum annað vístu tær fyrstu royndirnar, at grunnuri koppaði, tá tað var ov harður streymur. Hesin trupulleikin er loystur við at hjólini kunnu snara sær alt eftir hvussu tað rekur (Mynd 2).

**Framtíðarætlan**

Nú riggar hesin nýggi grunnur somikið væl, at við teimum seinastu broytingunum, sum ætlanin er at royna í 2004, skuldi málið hjá Líggjasi Hansen úr Sørvági við at gera ein umhvørvisvinarligan trolgrunn verið rokkið.



KRISTIAN ZACHARIASSEN
BIOLOGASSISTENTUR



*Mynd 1. Grunnurin við hjólum, sum snara sær alt eftir hvussu tað rekur.*







*Mynd 2. Undirsjóvarupptøka, sum vísir niður á síðuna á umhvørvisvinarliga grunninum (vinstrumegin) og niður á miðjuna á umhvørvisvinarliga grunninum (høgrumegin).*